# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1436.
# Tíðarskeið: 3/9-10/9 - 2014

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Lis Larsen og Helga Bára Mohr Vang.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, og longu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, livur og øðrum, varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu og longu. Magar vórðu tiknir av ymiskum fiskasløgum. Tveir menn frá Kringvarpinum vóru við og tóku upptøkur av arbeiðsgongdini umborð umframt at savna tilfar um toskin á Føroyabanka. Fiskar vórðu tiknir til Vísindavøkuna.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 3/9 kl 18:30. Tóku støðir hósdagin í norðara parti av bankanum, fríggjadagin djúpt vestanfyri og brúktu leygardagin, sunnudagin og mánamorgunin at taka støðirnar á tí grunna á bankanum. Tað gekk sera væl í hond og veðrið var sera gott, uttan kanska fríggjadagin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 9. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Tað var framvegis sera lítið av toski (Talva 1), serliga í mun til árini frá 1996 til 2003 (Mynd 1). Vit fingu lítið av hýsu, men tó nakað av smáari hýsu. Veiðan av upsa var sera lítil. Hinvegin er nøgdin av glýsufiski økt munandi seinnu árini (Mynd 1). Magakanningarnar vístu, at tað var meira til av bæði smáari og stórari nebbasild enn vanligt hevur verið seinastu árini. Nøgdin av krabbadýrum í toska- og hýsumagum var framvegis lítil í mun til onnur ár. Hitin við botn lá millum 8 og 11 gradir.

Magnus Heinason hevur eisini gjørt yvirlitstolingar á Føroyabanka um várið, frá 1983 og til í dag, sí túrfrágreiðing fyri túr 1408. Ein øking var í nøgd av toski í 2014 í mun til árini frammanundan, og spurningurin var, um toskurin var í ferð við at koma fyri seg aftur. Yvirlitstrolingin í heyst vísir, at tað neyvan er hent.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1436 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| Fiskaslag | KG í 29 hálum í 2014 | Nytrur | Magar | KG í 29 hálum í 2013 | Lutfall kg per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 2328.333 | | 3 | 2935.445 | 0.79 |
| KNURRHANI | 1681.490 | | 5 | 893.430 | 1.88 |
| HÝSA | 1387.082 | 398 | 115 | 1032.274 | 1.34 |
| GULLLAKSUR | 572.043 | | | 1655.384 | 0.35 |
| TOSKUR | 515.075 | 44 | 33 | 347.465 | 1.48 |
| GLÝSUFISKUR | 394.018 | 10 | 10 | 654.149 | 0.60 |
| LOLIGO | 208.937 | | | 1077.781 | 0.19 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 172.961 | | | 173.851 | 0.99 |
| LONGA | 164.560 | 40 | 3 | 284.305 | 0.58 |
| SILVURMURTUR | 149.950 | 5 | 5 | 94.047 | 1.59 |
| UPSI | 146.230 | 32 | 27 | 78.215 | 1.87 |
| SVARTKJAFTUR | 114.787 | | | 918.079 | 0.13 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 87.812 | | | 173.583 | 0.51 |
| SKRAMBUL | 58.780 | | | 1194.827 | 0.05 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 57.260 | | | 83.040 | 0.69 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 35.516 | | | 29.605 | 1.20 |
| SANDSPRØKA | 33.089 | | | 13.158 | 2.51 |
| SKRUBBHÁVUR | 28.350 | | 1 | 14.910 | 1.90 |
| BROSMA | 26.910 | 11 | | 45.790 | 0.59 |
| BLÁLONGA | 26.725 | 7 | 4 | 0.000 | |
| HALAHVASSA SKØTA | 26.500 | | | 0.000 | |
| LÝRUR | 23.125 | | | 4.730 | 4.89 |
| TUNGA | 22.640 | | | 10.202 | 2.22 |
| LÍTLA BROSMA | 19.952 | | | 23.059 | 0.87 |
| HAVTASKA | 19.065 | | | 83.935 | 0.23 |
| SKØTA | 15.765 | | | 11.265 | 1.40 |
| HAVNEBBASILD | 14.566 | | | 0.000 | |
| GLASKVOYSA | 10.291 | | | 7.764 | 1.33 |
| STINGLAKSUR | 8.723 | | | 0.000 | |
| REYÐI KNURRHANI | 6.132 | | | 0.785 | 7.81 |
| HVASSHVOYSA | 5.530 | | | 0.000 | |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 4.347 | | | 20.307 | 0.21 |
| SANDSKØTA | 3.567 | | | 0.000 | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 2.803 | | | 0.000 | |
| HUMMARI | 1.246 | | | 0.000 | |
| FERBLETTUTA KVOYSA | 0.992 | | | 0.000 | |
| ROSSAMAKRELUR | 0.380 | | | 2.038 | 0.19 |
| HEKSAKRABBI | 0.350 | | | 0.300 | 1.17 |
| VØRPUSKEL | 0.284 | | | 0.000 | |
| KIKARAFISKUR | 0.253 | | | 0.000 | |
| NEBBASILD | 0.139 | | | 9.137 | 0.02 |
| HAVGØLTUR | 0.050 | | | 0.000 | |
| TILSAMANS | 8376.608 | 547 | 206 | | |




Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av toski, hýsu og glýsufiski hjá Magnusi Heinasyni í september 1996 til 2014.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum "Tur1436d.doc".

<u>Petur Steingrund</u>